Invest in the Faroe Islands
An Agency of the Ministry of Industry, Trade and Communication

R.C. Effersøesgøta 30 • PO Box 179
FR-110 Tórshavn • Faroe Islands
Telephone +298 19075 or +298 11864 • Fax +298 17278
e-mail: invest@olivant.fo

Útlendskar íløgur í Føroyum

Forkanning

Tórshavn 12. Februar 1998

Vinnumálaráðið
Postboks 377 • FO-110 Tórshavn
Tlf. 35 60 60 • Fax 35 60 65
vmr@vmr.fo • www.vmr.fo

Innihaldsyvirlit

Síða

1. Fororð 3

2. Stuttur samandráttur 4

3. Tilmæli 5
   - Skipan 5
   - Kostnaður 6

4. Íløguframtaksvirksemi 7
   - Alment um útlendskar íløgur 7
     - Kapitalur 7
     - Vitan 7
     - Arbeiðspláss 7
     - Netverk 8
     - Tøkni 8
     - Nýggir marknaðir 8
     - Búskaparlig ávirkan 8
   - Íløguframaskipanir í øðrum londum 8
     - Danmark 8
     - Ísland 9
     - Írland 9
   - Venture kapitalur 10
   - Kapping um bestu vinnukarmarnar 10

5. Støðið undir forkanningini 11
   - Samandráttur av forsøguni í málinum 11
   - Niðurstøða og tilmæli frá sjálvbodna arbeiðsbólkinum 12

6. Forkanningin 14
   - Útvaldu londini 14
   - Útvaldu høvuðsvinnubólkarnir 15
   - Úrslit av forkanningini 16
     - Aftursvar býtt á lond 17
     - Aftursvar býtt á vinnubólkar 18
     - Fyritøkurnar sum eru positivar 19
     - Samanumtikið um beinleiðis sendingarnar 19
   - Samrøður við fyritøkur, ið hava svarað positivt 20
     - Úrslit av samrøðum 22
       - Partafelagsskattur 22
       - Flutningur 22
       - Arbeiðsmegi 23
       - Umhvørvi 23
       - Softwareframleiðsla 23
       - Kunningartilfar 24
   - Niðurstøða av samrøðum 24

7. Olja 25

8. Niðurstøða 26
   - Skipan 27
   - Kostnaður 28

Skjal 1: Kostnaðarætlan fyri framtakið í 1998 29
Skjal 2: Kostnaður av forkanningini 30

2. STUTTUR SAMANDRÁTTUR

Føroya landsstýri hevur í 1997 latið eina forkanning gera, fyri at meta um møguleikar eru at fáa útlendskar íløgur til Føroyar. Forkanningin skuldi lýsa um útlendskur áhugi yvirhøvur var til steðar fyri at gera íløgur í Føroyum, og í hvønn mun verandi vinnulívskarmar vóru nøktandi.

Tilfar um Føroyar og føroyska vinnuumhvørvið er framleitt til endamálið og er sent til umleið 2200 fyritøkur í Hollandi, Schweiz, Týsklandi, Australia, Singapore, Hong Kong og USA. Fyritøkurnar virka innan alternativa fiskivinnu, alternativa fiskaaling, fiskarítøkni, fiskarídatatøkni, hátøkniframleiðslu, softwareframleiðslu, kunningartøkni, tænastur til oljuvinnu, tænastur til skip, drykkjuvørur, heilivág, heilsuídnað og biokemiska framleiðslu.

Umleið 3 % av fyritøkunum svaraðu aftur og av teimum vóru 30 – 40 %, sum søgdu seg hava áhuga fyri at kunna seg meiri gjølla um Føroyar og vinnumøguleikarnar her. Fyritøkur í Hollandi, Schweiz og Australia vístu størsta áhugan, men eisini stórar fyritøkur í Týsklandi og USA hava víst áhuga.

Nakrar av fyritøkunum, sum hava víst áhuga, eru longu vitjaðar. Herumframt eru stovnar, sum Danska Uttanríkismálaráðið, Invest in Denmark og Invest in Iceland, sum eisini fáast við íløguframtaksvirksemi, vitjaðir.

Forkanningin og samrøðurnar við fyritøkur hava staðfest, at tað ikki eru beinleiðis forðingar fyri at fáa útlendskar íløgur til Føroya. Áhugi er fyri at vita meira um møguleikarnar, herundir møguliga við beinleiðis vitjanum. Men tað er eisini komið fram, at vinnulívskarmar í øðrum londum eru meira áhugaverdir, og at okkara samfelag er ov lítið til stórar virkiseindir.

Í stuttum er niðurstøðan av forkanningini, at eitt miðvíst og áhaldandi arbeiði fyri at fáa útlendskar íløgur til Føroya, er ein týdningarmikil partur av arbeiðinum at fáa føroyska samfelagnum fleiri bein at standa á, kappingarførar vinnulívskarmar og altjóðagerð av føroyskum vinnulívi. Eisini eigur arbeiði at verða gjørt, sum kann stimbra føroyskum fyritøkum í samstarvi teirra við útlond og útlendskar fyritøkur

3. TILMÆLI

Arbeiðsbólkurin mælir landsstýrinum at seta í verk eitt framtak, sum miðar ímóti, at:

1. **Fáa útlendskar íløgur til Føroyar.**
2. **Vísa føroyskum fyritøkum á menningarmøguleikar í útlendskum samstarvi og hjálpa teimum at fáa slík samstørv í lag.**
3. **Meta um og menna vinnulívskarmarnar í Føroyum, gjøgnum samskifti við útlendskar fyritøkur og stovnar.**
4. **Menna fatanina í Føroyum av, at útlendskar íløgur eru eitt gott og mennandi íkast fyri føroyska samfelagið.**
5. **Framleiða tilfar, ið lýsir Føroyar á ein bæriligan, trúverdugan og positivan hátt.**
6. **Kunna um Føroyar í útlondum og vísa á teir møguleikar, sum eru til staðar.**

Framtakið eigur at verða skipað á ein slíkan hátt, at tað breitt hevur undirtøku í vinnu og hjá stovnum í Føroyum. Dentur eigur at verða lagdur á, at innlit í altjóða kappingina um kapital, vitan og virksemi verður uppbygd her og liggur til grund fyri arbeiðinum frameftir.

Framtakið eigur at hava møguleikar fyri at nýta útlendskar ráðgevarar í arbeiðinum og at hava gott samstarv við aðrar stovnar, sum arbeiða á sama øki, til dømis Invest in Denmark og Invest in Iceland.

Framtakið eigur at nýta fleiri hættir at gera vart við Føroyar og koma í samband við møguligar íleggjarar í útlondum.

SKIPAN

Fyri at kunna veita eina tænastu, ið útlendskir íleggjarar eru nøgdir við, og sum er á hædd við ta tænastu, teir kunnu fáa í øðrum londum, eigur framtakið at verða knýtt at einari skrivstovu/einum skrivstovusamstarvi. Ein útlendskur áhugaður eigur at fáa skjótt svar, umbiðið tilfar og rætta tilvísing til stovnar og lyklapersónar. Hetta uttan mun til um tann, sum stendur fyri framtakinum vitjar fyritøkur ella í øðrum ørindum er uttanlands.

At standa fyri sjálvum framtakinum er neyðugt við í hvussu so er einum fulltíðarsettum persóni. Við tilknýti til skrivstovu/skrivstovusamstarv kann kostnaðurin av hesari tænastu verða avmarkaður. Tá framtakið er komið í fasta legu, eiga 2 fólk at verða knýtt at tí, við tí játtan sum er neyðug til tað arbeiði, sum í hesum sambandi eigur og má verða gjørt.

Skotið verður upp, at framtakið verður tænastuliga knýtt at Vinnuhúsinum og Menningarstovuni, ið skal hava formligu ábyrgdina, og at tað annars liggur undir Vinnumálastýrinum. Ein

breiður ráðgevandi bólkur eigur at verða knýttur at framtakinum, á sama hátt sum tað hevur verið gjørt í forkanningini, fyri bæði at kunna stuðla framtakinum við tí servitan, hesi fólk hava og fyri at tryggja so góða undirtøku fyri framtakinum sum gjørligt, bæði hjá almennu myndugleikunum, vinnulívinum og vanliga fólkinum. Mælt verður herumframt til, at framtakið hevur neyvt samstarv við aðrar stovnar, bæði í Føroyum og uttanlands, sum kunnu stuðla og hjálpa við serligum uppgávum, og sum tað hevur týdning at kunna um gongdina.

KOSTNAÐUR

Sum skjal til hesa frágreiðing er løgd við kostnaðarætlan uppá 1.000.000 kr. fyri framtakið í 1998. Hon byggir á uppskotna skrivstovutilknýti, og at tænastur í ávísan mun verða keyptar frá føroyskum og útlendskum tænastuveitarum og serfrøðingum. Tað er herumframt lagt upp til samstarv við útlendskar ráðgevar. Hesir eru á staðnum, har møguligu fleggjararnir halda til, og eru harafturat sera góðir í ráðum og kunnu taka sær av einum parti av tí arbeiði, ið skal gerast í útlondum.

Í kostnaðarætlanini fyri 1998 er ikki lagt upp til "direct mailing", men í fyrsta umfari at fara undir gerð av nýggjum tilfari, sum lýsir Føroyar á serligan hátt, t.d. umhvørvið, biotøkniliga ella møguleikar fyri softwareframleiðslu.

Kostnaðarætlanin byggir á verandi játtan á løgtingsfíggjarlógini fyri 1998. Upphæddin verður mett í teprara lagi, og tí eigur rúmari játtan at verða sett av á komandi fíggjarlógum, ið tryggjar, at framtakið kann verða miðvíst og áhaldandi. Ikki ber til at fáa munagóð úrslit eftir stuttari tíð. Íløgur í útlondum er hóast alt eitt av teimum økjum har fyritøkurnar hava longstu ætlanarlegging, ofta 5 – 10 ár.

4. ÍLØGUFRAMTAKSVIRKSEMI

ALMENT UM ÚTLENDSKAR ÍLØGUR

Tað er í dag næstan ikki tað land, tann región, tann oyggjabólkur ella tann býur í heiminum, sum ikki á ein ella annan hátt roynir at gera vart við seg sum eitt frálíkt stað at gera íløgur í.

Í altjóða tíðarritum og avísum eru lýsingar og greinir, sum hálova einum ávísum øki. Hetta er ikki uttan grund. Altjóðagerðin og tann støðugt fríari marknaðurin fyri vørum og tænastum ger, at kappingin er vorðin nógv harðari, og tí flyta fyritøkur, kapitalur, vitan og arbeiðsmegi hagar, møguleikarnir eru fyri størsta ágóða.

Tey lond og øki, sum kunnu vísa á frægastu møguleikarnar, royna tí at draga kapital og útlendskar fyritøkur til sín fyri harvið at skapa størri framgongd og fleiri arbeiðspláss í økinum og fyri at menna sítt kappingarføri enn meira.

Íløguframtaksvirksemi er næstan vorðið ein ídnaður í sær sjálvum við nógvum aktørum. Danski handilssendimaðurin í New York fyri Invest in Denmark, Leif Wassermann, hevur t.d. nevnt, at teir kappast við umleið 1000 ymisk framtøk, sum royna at fáa íløgur frá USA til teirra land, región ella bý. Hetta vísir, hvussu hørð kappingin um útlendskar íløgur er vorðin, og hvussu týdningarmikil partur útlendskar íløgur verða hildnar at vera fyri vinnuligu menningina í einum landi.

Nógvir fyrimunir verða mettir at koma við útlendskum íløgum. Her skulu stutt verða nevndir nakrir av hesum fyrimunum.

Kapitalur
Í sambandi við altjóðagerðina er kapitalur vorðin meira og meira mobilur og flytir seg til tey lond, har sannlíkt er, at hann kastar mest av sær, og har fáar forðingar eru fyri kapitalflutningi. Útlendskar íløgur eru soleiðis eitt gott ískoyti til landsins egnu kapitalorku, og ofta virka tær í samspæli við lokalum kapitali í teimum verkætlanum, sum verða settar í verk.

Vitan
Í kjalarvørrinum á útlendskum íløgum fylgir ofta servitan, t.d. patentir og serligir framleiðsluhættir, sum eru styrkin hjá júst íleggjarafyritøkuni. Henda nýggja vitan seyrar spakuliga út til fyritøkurnar í lokala vinnuumhvørvinum og kemur á henda hátt móttakaralandinum til góða.

Arbeiðspláss
Tá ið nýtt virksemi verður sett á stovn, er sjálvandi neyðugt við lokalum starvsfólki at loysa ymisku arbeiðsuppgávurnar. Útlendskar íløgur føra tí, sum oftast, til eitt økt virksemi, nýggj arbeiðspláss, og til arbeiðspláss sum krevja nýggjan førleika. Hetta úrslit av útlendskum íløgum

er sjálvandi serliga kærkomið, har stórt arbeiðsloysi valdar og nakrir av íløguframastovnunum í útlondum, hava eisini sum høvuðssetning at fáa sett á stovn virkir, ið skapa nógv arbeiðspláss.

Netverk
Ofta eru fyritøkur sum gera íløgur í útlondum, partar av stórum netverkum. Hesi netverk kunnu bæði vera knýtt at framleiðslu, gransking, vørumenning, tænastuveitingum, marknaðarføring og sølu. Hesi netverk koma eisini móttakaralandinum til góða, gjøgnum økt samskifti og samarbeiði. Ofta byggja slíkar nýggjar fyritøkur eisini netverk upp í lokalsamfelagnum, eitt nú til granskingarstovnar, skúlar, samstarvsfyritøkur og undirveitarar.

Tøkni
Útlendskar fyritøkur føra eisini nýggja tøkni við sær, sum eisini so við og við kemur tí lokala vinnulívinum til gagns. Lokalar fyritøkur verða noyddar til alla tíðina at menna seg og fylgja við í tøkniliga rákinum, samstundis sum arbeiðsmegin økir sínar førleikar.

Nýggir marknaðir
Fyritøkur sum gera íløgur í útlondum hava oftast marknaðaratgongd og førleika at selja tær vørur/tænastur, sum ætlanin er at framleiða í sambandi við íløguna. Tískil kann ein slík íløga ofta gerast eitt "lokomotiv" fyri lokalar fyritøkur í sambandi við sølu og marknaðarføring. Á henda hátt fáa lokalar fyritøkur møguleikar á marknaðum, har tær áður ikki megnaðu at gera seg galdandi.

Búskaparlig ávirkan
Sum fyrr nevnt økir tann beinleiðis útlendska íløgan um kapitalnøgdina í samfelagnum. Harafturat kemur útgjald av lønum og keyp av vørum og tænastum frá lokalum undirveitarum. Eisini tann partafelagsskattur og tey avgjøld, sum fyritøkan skal gjalda, økja um fíggjarligu styrkina hjá landinum.

ÍLØGUFRAMASKIPANIR Í ØÐRUM LONDUM

Øll londini rundan um okkum hava eitt skipað íløguframtaksvirksemi, og hjá flestu av teimum hevur tað longu nógv ár á baki. Bæði Danmark og Ísland hava eina slíka skipan. Tað landið sum hevur eydnast einabest við slíkum virksemi er Írland, sum av flestu londum verður mett sum fyridømi. Eisini eru tað nógvar regiónir og býir, sum hava sínar egnu íløguframaskipanir.

Danmark
Í Danmark kallast almenni framtaksstovnurin fyri at fáa útendskar íløgur til landið, Invest in Denmark. Hetta er sjálvstøðug deild undir Vinnumálaráðnum, har umleið 18 fólk arbeiða. Harafturat er sera tætt samarbeiði við Uttanríkismálaráðið og donsku sendistovurnar, sum gera nógv arbeiði fyri Invest in Denmark. Deildin varð sett á stovn í 1989 og fær eina árliga játtan uppá umleið 30 milliónir kr. Sjálvt um hetta kann tykjast at vera eitt í okkara eygum stórt framtak, so er tað higartil bert eydnast at fáa útlendskar íløgur, sum hava skapt eini 1500-2000 arbeiðspláss. Tann størsta einstaka íløgan uppá 120 milliónir kr. er frá Japan, og er hon í sambandi við állaaling í Hanstholm í Jyllandi. Her verða állar aldir, sum seinni verða útfluttir til

Japan og nýttir í einari japanskari serframleiðslu. Tá henda verkætlan er liðugt útbygd, fara eini 200-300 fólk at arbeiða har.

Invest in Denmark hevur tætt tilknýti til teir sokallaðu regionalu fløguframafelagsskapirnar (RIFO), sum taka sær av tí arbeiði, sum skal gerast runt um í Danmark, t.d. at finna samstarvsfyritøkur, egnaði hølir/grundøkir og at skipa fyri, tá ið útlendskir fleggjarar koma at hyggja at møguleikunum í einum ávísum øki.

Danska fløguframaskipanin hevur eisini sum uppgávu at fáa útlendskar fløgur til Føroyar og Grønland. Stjórin Peder Petersen heldur onki vera til hindurs fyri samstarvi við føroyska fløguframtakið.

Ísland
Invest in Iceland, er tann almenna íslendska fløguframaskipanin. Herumframt er annar stovnur, ið tekur sær av útlendskum fløgum, sum eru serliga orkukrevjandi. Invest in Iceland er rættiliga nýggj skipan, bert 3 ára gomul, og hevur 3 starvsfólk beinleiðis knýtt at sær. Árliga játtanin er umleið 15 milliónir ísl. kr. Hon er knýtt at íslendska útflutningsráðnum og hevur tætt samstarv við íslendsku sendistovurnar úti í heimi. Fólk frá Invest in Iceland eru ofta við Uttanríkisráðharranum á ferðum í útlondum, bæði tí at hetta ofta gevur atgongd til møguligar útlendskar fleggjarar á høgum støði, og tí at týdningarmikið er at menna sambandið við íslendsku stovnarnar og sendistovurnar, sum eru við á ferðunum. Stjórin á Invest in Iceland, Ingi Ingasson, er positivur fyri samstarvi við føroyingar og heldur, at nógvir felagsnevnarar eru í íslendsku og føroysku møguleikunum á hesum øki.

Írland
Tað land um okkara leiðir, sum skarar burturúr, tá ræður um at fáa útlendskar fløgur, er Írland. Írland sum fyrr hevði trupulleikar við stórum arbeiðsloysi, og at stórur partur av unga fólkinum flutti av landinum, hevur í 80'unum og 90'unum við miðvísum fløguframapolitikki megnað at vent hesari gongd. Í dag er støðan tann, at stórar útlendskar fyritøkur javnan seta stór virki á stovn bæði innan framleiðslu og tænastur.

Her skal nevnast, at Irish Development Agency er ein av størstu fløguframaskipanunum, við eini árligari játtan uppá yvir 100 milliónir kr. og umleið 250 starvsfólkum.

Írland hevur miðvíst bøtt um fløgukarmarnir. Hetta merkir m.a. at nýggj virkir ongan skatt gjalda, bíligt er at fáa hølir/grundøki, lønar- og kostnaðarstøðið er lágt, og arbeiðsmegin er vælútbúgvin. Sum dømi kann nevnast, at IBM nýliga hevur latið eitt "call-center" upp við nærum 1000 starvsfólkum. Góðu fløgukarmarnir saman við tí positivu móttøku, útlendskar fløgur verða møttar við, gjørdu. at ongin ivi var um, at Írland var besta staðið til hesa fløguna.

Írland er annars nú um at koma í miskredit í øðrum ES-londum, tí framtakið hevði ikki kunna verið fíggjað so væl uttan ES-stuðulin til útjaðaraøki.

VENTURE KAPITALUR

Ein annar háttur at fáa kapital til vega er frá sokallaðum "Venturefeløgum". Hetta eru feløg, sum við at seta pening í nýggjar vágakendar verkætlanir, vóna at fáa ein vinning, sum er størri enn við vanligari uppsparing, lánsbrøvum o.l. Stórir útlendskir eftirlønargrunnar, hava oftani ein part av ogn síni, sum oftast undir 5 %, í eini slíkari "venturedeild".

Tað hevur eydnast Invest in Iceland, í samarbeiði fleiri við smáar softwarefyritøkur í Íslandi, at fingið altjóða venturekapital til vega til fleiri verkætlanir í Íslandi. Í hesum førinum hevur fløgan frá "venturefeløgunum" vanliga ligið um 2 milliónir $ fyri hvørja verkætlan.

KAPPING UM BESTU VINNUKARMARNAR

Stór kapping er millum tey ymisku økini/londini um at fáa útlendskar fløgur.

Kappast verður bæði við hvussu lágan partafelagsskatt, tú kannst bjóða fleggjarum, og við beinleiðis stuðli í sambandi við fløgur. Eitt annað týdningarmikið amboð í kappingingini er, hvussu fáar avmarkingar eru í vinnulívskarmunum. Hetta kunnu t.d. vera avmarkingar í sambandi við kapitalflyting, ognarrætt til partafeløg, ognarrætt til rávørugrundarlag, almennum pappírsveldi, socialari trygd hjá starvsfólki, arbeiðsumhvørvi, uppsagnartíð og arbeiðstíð hjá starvsfólki. Eisini verða bílig ella ókeypis høli/grundøki nýtt í hesi kapping.

Onnur øki sum útbúgvingarmøguleikar, frítíðarmøguleikar og mentan verða nýtt sum agn í kappingini um útlendsku fløgurnar. Eisini kostnaðarstøði er sera týdningarmikið fyri, hvagar útlendskar fløgur velja at fara. Nógv lond royna tí at tálma lønarvøkstri og hava lágar samskiftis- og orkuprísir.

Samanbering av egnum vinnulívskarmum við teir í øðrum londum og ábøtur á egnar karmar er tí ofta partur av framtaksarbeiði fyri útlendskum fløgum.

5. STØÐIÐ UNDIR FORKANNINGINI

SAMANDRÁTTUR AV FORSØGUNI Í MÁLINUM

1. Málið um eitt framtak fyri at fáa útlendskar fløgur til Føroya byrjar, tá Geert M. Hovens, ráðgevi í fløguspurningum, í mars/aprí 1995 vendir sær til Tryggva Johansen á Føroysku Viðskiftastovuni í Keypmannahavn um møguleikarnar at veita Føroyum ráðgeving um at fáa útlendskar fløgur til landið.

2. Á summarfrí í Føroyum í døgunum 5. - 16. juni 1995 fekk Geert Hovens høvi at hitta Óla Jacobsen, landsstýrismann, Arne Poulsen, Kjartan Kristiansen og onnur á máli. Á hesari vitjan fekk landsstýrið ymiskt tilfar og hugsanirnar hjá Geert Hovens og samstarvsfelaga hansara, Stevens R. Cines, umframt CV hjá hesum báðum.

3. Landsstýrið bað serkønan í Uttanríkismálaráðnum siga sína hugsan um tilboðið frá Geert Hovens. Á heysti 1995 ráddu Føroyska Viðskiftastovan og Menningarstovan landsstýrinum til at royna samstarv við Hovens, undir teimum fyritreytum m.a., at samstarvið varð skipað íggjøgnum ein føroyskan arbeiðsbólk, ið umboðaði embætisfólk og vínnulívsfólk, ið høvdu arbeitt við karmum fyri føroyskari vinnu, við útflutningsspurningum og við at gera Føroyar sjónligar uttanlands.

4. Á løgtingsfíggjarlógini 1996 vórðu avsettar 800.000 kr. til eitt framtak fyri útlendskum fløgum.

5. Í januar 1996 verða uppskot um skipan av einum framtaki løgd fyri landsstýrið. Greitt var, at 800.000 kr. ikki fóru at røkka til tað arbeiðið, ið Hovens og Cines høvdu lagt upp til. Dentur varð lagdur á, at skuldi nakað skilagott í longdini spyrjast burtur úr einum framtaki, var neyðugt,

   at politiskur og vinnuligur vilji er fyri at fáa útlendskar fløgur hendan veg,
   at skattaskipanir, virkisumhvørvi v.m. "gearast til" slík framtøk, og
   at almenni sektorurin "gearast til" skjótar avgerðir í málum, sum koma,

   so tað ber til "at fáa grindina í pottin", tá hon er komin "í drepning".

   "Arbeiðsbólkurin", nevniliga Arne Poulsen, Signar Heinesen, Karin Toftegaard, Tryggvi Johansen og Kjartan Kristiansen, mæltu landsstýrinum til at seta ein prosjektbólk við løntum lyklapersónum at gera eitt forprosjekt saman við útlendsku ráðgevarunum um møguleikarnar at fáa útlendskar fløgur til Føroya. Endamálið við forprosjektinum var at gera eina greiða ætlan fyri møguligum framhaldandi og málrættaðum arbeiði, og snýr seg um:

Í samstarvi við ráðgevararnar at analysera møguleikarnar at fáa útlendskar íløgur,
At skráseta verandi støðu og møgulig krøv um neyðugar broytingar sum eru fyritreytir, og
At menna almennan áhuga fyri útlendskum íløgum og velja út áhugaverdar sektorar.

6. Í februar 1996 tók landsstýrið undir við tilmælinum. Fyrireikaður varð síðan fundur við Hovens í Føroyum 12. apríl, ið avdúkaði, at tað ikki var so lætt at finna eina loysn, ið allir partar kundu taka undir við. Komið varð tó til ta niðurstøðu, at frægasti møguleikin at koma víðari var,

7.

at arbeiðsbólkurin sjálvur fremur forprosjektið, tó við (undirhonds) hjálp og ráðgeving frá Hovens og Cines, eitt nú um skriv til útvald virki, ið skulu luttaka í forkanningini, gerð av fact sheet og spurnarblaði og eftirmeting av spurnarkanningini. Fyri ávísar beinleiðis útreiðslur, ið Hovens og Cines koma at hava v.m., kann endurgjald og samsýning verða latin teimum.

at føroyski parturin setti upp uppskotið skrivliga og somuleiðis eisini uppskot um skriv, spurnarblað og fact sheets, ið so varð sent Hovens og Cines til metingar, viðmerkingar, rættingar og ískoyti. Samstundis var so neyðugt at fyrireika tilfar til politisku myndugleikarnar.

NIÐURSTØÐA OG TILMÆLI FRÁ SJÁLVBODNA ARBEIÐSBÓLKINUM

Forkanningin, ið hereftir varð skotin upp fyri landsstýrinum, snýr seg í stuttum um

at senda út skriv til eini 1.000 útvald virki í útlondum við ávísum upplýsingum um Føroyar og við umbøn um, at virkini, hava tey áhuga at frætta meira um Føroyar og Føroyar sum land at seta fyritøku á stovn í, gera vart við, at tey hava henda áhuga og ynskja at hitta umboð fyri Føroyar,

at vitja tey virki, ið svara aftur, og hava samrøðu við tey um møguleikar í Føroyum, og um hvørji krøv/ynski tey hava, fyri at Føroyar sum íløguland skal haldast áhugavert, og

at samanfata úrslitini av forkanningini í frágreiðing til landsstýrið og gera tilmæli um, hvussu eitt møguligt framhaldandi framtak fyri at fáa útlendskar íløgur til Føroya eigur at verða skipað og framt, herundir, hvat forarbeiði má gerast.

Arbeiðsbólkurin helt, at forkanningin fór at taka einar 6 -7 mánaðir, og at frágreiðing og tilmæli í fyrsta lagi kundi liggja hjá landsstýrinum u. 1. apríl 1997. Neyðugt var at seta lønt fólk til burturav at taka sær av forkanningini undir leiðslu arbeiðsbólksins. Ítøkiliga skuldi lønta fólkið taka sær av hesum uppgávum:

a. Fyrireika uppskot til endaligt val av virkjum at senda skriv út til. Virkini skulu verða spjadd á tær vinnugreinir, ið arbeiðsbólkurin heldur vera ráðiligast, á støddir á virkjum og geografiskt. Valið verður gjørt út frá databasum og yvirlitum yvir virki. Høvuðsyvirlitini verða keypt og kannað verður víðari, í hvønn mun virkini eru "røtt" at venda sær til. (Hovens skeyt í sínum uppleggi fyri fundin 12. aprí, at skriv skuldu sendast út til u. 27.500 virki. Tá hevði útveljingararbeiði ikki gjørst so trupult og heldur ikki so kritiskt, sum tá einans 1.000 virki skulu veljast.) Roknað varð við "undirhonds" hjálp og ráðgeving frá Hovens og Cines í hesum arbeiðinum.

b. Við "undirhonds" hjálp frá Hovens og Cines skuldi hann gera uppskot til form og innihald av upplýsingum at senda út til útvaldu 1.000 virkini, herundir eisini introduktiónsskriv og uppskot um, hvussu virkini, ið hava áhuga, kunnu boða okkum frá um henda áhugan. Arbeiðsbólkurin gjøgnumgekk á fundinum 22. august tað higartil gjørda arbeiði við at gera upplýsingartilfar um Føroyar, ið partvíst kann verða nýtt ístaðin fyri *Faroese Business Environment*, men annars kann verða nýtt av fyritøkum og at leggja inn á eitt nú internetið. Frammanundan eru royndir gjørdar við Infrastrukturfaldara um Føroyar - *a North Atlantic Resource Centre* - og arbeiðsbólkurin helt, at grundtilfar var til at gera lítið upplýsingarrit at nýta serliga í hesari forkanningini.

c. Standa fyri útsendingini av skrivum, og seinni svara teimum virkjum, ið hava sýnt áhuga, og fyrireika fund við hesi.

d. Saman við Hovens og Cines skuldi hann fyrireika uppskot um tað spurnarblað, ið ætlanin er at føra samrøðurnar við áhugaðu virkini eftir.

e. Vera við til at gjøgnumføra samrøðurnar við virkini, fyrireika møguligar upplýsingar, ið virkini trúliga hava áhuga fyri, og samanfata úrslitini av hvørjari samrøðu, soleiðis at tey kunnu brúkast í endaligu frágreiðingini til landsstýrið.

f. Saman við Hovens, Cines og arbeiðsbólkinum fyrireika frágreiðing til landsstýrið við niðurstøðu og tilmæli um, hvat víðari skal gerast og hvussu.

Kostnaðin av frammanfyri nevnda arbeiði metti arbeiðsbólkurin fara at liggja u. 500-600.000 kr., og at tað fór at taka einar 6 -7 mánaðir, eftir at avtala kundi verða gjørd við lønta fólkið.

26. september 1996 góðkendi landsstýrið tilmælið um forkanningina, ið hereftir kundi fyrireikast sum uppskotin.

Samráðingar vórðu tiknar upp við Jens Petur Bærentsen, siviløkonom, ið var staddur niðri, og sum var mettur at hava førleika at átaka sær uppgávuna, og avtala varð síðan gjørd við hann, um at hann kundi byrja 15. november 1996.

6. FORKANNINGIN

Sum áður nevnt tók landsstýrið á heysti 1996 avgerð um, hvussu farast kundi undir eina forkanning av einari verkætlan at fáa útlendskar fløgur til Føroya.

Føroyski arbeiðsbólkurin, ið skuldi samskipa forkanningina, fekk tí eisini litið upp í hendur at standa fyri henni. Mett varð, at tað var ógvuliga týdningarmikið, at samskipanin fór fram í Føroyum. Hetta ger tað munandi lættari at fylgja við og tískil taka skjótar avgerðir, samstundis sum vitanin og royndirnar frá forkanningini eru til taks her á landi til eitt møguligt framhaldandi fløguframtak. Eisini er eyðsæð, at verkætlanir, vit sjálvi eiga stóran lut í, lættari vinna frama hjá føroyska vinnulívinum.

Forkanningin, ið varð sett í verk, hevði sum arbeiðssetning, at

- útvega landsstýrinum haldgott grundarlag, so avgerð kann takast um eitt rættiligt framtak skal setast í verk,
- vísa á hvussu eitt slíkt framtak eigur at verða fyriskipað,
- kanna um broytingar og tillagingar av vinnulívskarmunum v.m. í Føroyum eru neyðugar, til gagns fyri bæði føroyskar og útlendskar fyritøkur,
- fáa vitan, netverk, kapital og arbeiðspláss til føroyska samfelagið,
- menna almenna áhugan fyri og fatanina av, hvussu týdningarmikið íkast útlendskar fløgur kunnu geva Føroyum.

ÚTVALDU LONDINI

Fyri at forkanningin skuldi vera so nøktandi, sum til ber, varð avgjørt at venda okkum til trý ymisk øki í heiminum, har mett varð, at áhugi kundi vera fyri at gera fløgur í Føroyum, vágafúsur kapitalur var til taks, og vinnulívið var so framkomið, at tað kundi føra nakað munagott til føroyska samfelagið. Hesi trý útvaldu økini vóru **Europa, Norðuramerika og Fjareystur**. Síðani vórðu 7 lond í hesum økjum vald út. Kostnaður av keypi av virkisyvirlitum frá databasum, møguleikarnir fyri skynsomum vali úr hesum og prentkostnaður o.a. við útsending førdi annars við sær, at avgjørt varð at venda sær til umleið 2500 fyritøkur í sambandi við forkanningina, heldur enn bert 1.000, sum upprunaliga ætlað.

Avgjørt varð, sum skotið upp av útlendsku fløguráðgevunum, at venda sær til fyritøkurnar við eini "direct mail" sending, sum á ein stuttan, snøggan og upplýsandi hátt kunnaði um Føroyar og vinnukarmarnar her á landi og gav fyritøkunum møguleika at biðja um fund, meiri nágreiniligt tilfar, samband við føroyskar samstarvsfelagar o.s.fr.

Avgjørt varð ikki at venda sær til okkara grannalond, tí flestu fyritøkurnar har á einhvønn hátt longu kendu til Føroyar og høvdu gjørt sær eina hugsan um samfelagið og vinnuumhvørvið her.

Londini, ið vald vórðu út og talið av sendum brøvum, vórðu:

• USA	840 fyritøkur
• Týskland	246 fyritøkur
• Holland	246 fyritøkur
• Schweiz	232 fyritøkur
• Australia	234 fyritøkur
• Singapore	222 fyritøkur
• Hong Kong	238 fyritøkur

ÚTVALDU HØVUÐSVINNUBÓLKARNIR

Arbeiði við at velja út vinnubólkar, sum grundarlag fyri adressulistarnar við fyritøkum, ið kundu hugsast at hava áhuga í at gera íløgur í Føroyum, og sum vórðu mettir áhugaverdir at fáa hendavegin, vóru útvaldir sera nágreiniliga. Sjálvt um tann ógvuliga umfatandi SIC-koduskipanin (yvir 1000 ymiskir vinnubólkar) varð nýtt, mátti ansast eftir, at bólkar ikki vórðu valdir út, har flestu virkir als ongan møguleika høvdu fyri at byggja upp vinningsgevandi virksemi í Føroyum. Hinvegin mátti eisini ansast eftir, at virkisbólkar, ið vóru áhugaverdir fyri Føroyar, ikki duttu burtur ímillum, men vórðu tiknir við.

Eisini var avgjørt at venda sær til størstu fyritøkurnar í teimum ymisku vinnubólkunum, tí størst møguleiki er fyri, at hesar fyritøkur hava fíggjarliga og menniskjaliga orku at gera útlendskar íløgur, samstundis sum hesar fyritøkur eru tær, ið mest sannlíkt hava henda tørv. So langt yvirhøvur gjørligt vórðu øll skriv stílað til navngivnan stjóra, nevndarformann ella persón, sum hevði myndugleika at taka avgerð.

Endaliga valið av vinnubólkum gjørdist hetta:

- Fiskivinna (alternativar fiskavørur)
- Fiskaaling (alternativar fiskavørur)
- Fiskarítøkni
- Fiskarídatatøkni
- Hátøkniliga framleiðsla
- Softwareframleiðsla
- Tænastur innan kunningartøkni
- Tænastur til oljuvinnu
- Tænastur til skip
- Drykkjuvørur
- Heilivágur
- Heilsuídnaður
- Biokemisk framleiðsla

Avgjørt varð, at sera nógv orka skuldi leggjast í at fáa tilfarið, ið sendast skuldi til fyritøkurnar, at taka seg væl út. Tað skuldi vera borðbært, so eingin vandi var fyri, at tað kundi verða mistikið fyri vera tilfar frá onkrum óálítandi avsendara. Svarprocentið í sambandi við slíkar "direct mail" sendingar er vanliga ógvuliga lágt, heilt niður ímóti 1 %.

Síðani var funnið fram til, hvussu útsjóndin á skrivliga tilfarinum, støddd, vekt, myndir, tekstur og litir, í høvuðsheitum skuldi verða.

Nógv orka var løgd í at finna fram myndatilfar um Føroyar, ið bæði var nútímans, dygdargott og lýsti Føroyar, føroyska vinnulívið og vinnukarmarnar her á landi. Burtursæð frá myndum, ið lýsa Føroyar í ferðavinnuhøpi, var sera torført at finna fram gott myndatilfar, og so gott sum ógjørligt at finna myndatilfar, ið lýsti føroyska vinnulívið og samstundis hevði góða myndagóðsku. Onkur mynd í faldaranum *Investing in the Faroe Islands*, varð tí gjørd beinleiðis til hetta tiltakið, og onkur mynd fekst til vega úr útlondum.

Samlaða tilfarið varð liðugt 17. Juli 1997, og byrjað varð at senda út 25. Juli 1997. Hetta var gjørt í samarbeiði við frímerkjadeildina hjá Postverk Føroya, sum stóð fyri at stempla frímerkini fyri eisini á henda hátt at økja um møguleikan fyri aftursvari. Eisini var avtala fingin við Postverk Føroya um avsláttur av postgjaldinum og um ófrankeraða svarkortið, sum varð sent við, so útlendsku fyritøkurnar ókeypis og ómaksleyst kundu svara aftur.

ÚRSLIT AV FORKANNINGINI

Tilsamans 2258 brøv vórðu send út. Av teimum eru 63 komin aftur; eitt nú tí fyritøkan er hildin uppat, skeiv adressa, ella tí móttakarin ikki arbeiðir har meira. Hetta má sigast at vera ein rættiliga lítil partur av samlaðu nøgdini.

Higartil eru 60 svar komin aftur, og svarar hetta í miðal til umleið 3,1 % av móttiknu brøvunum. Útlendsku fløguráðgevararnir, Hovens og Cines, siga hetta vera eitt høgt svarprocent í einum tiltaki sum hesum, serliga tá havt verður í huga, at Føroyar fyri hesar fyritøkur eru eitt heilt ókent øki. Av hesum 60 kunnu 20 - 25, umleið 1 %, metast sum positiv svar, sum beinleiðis kunnu nýtast at arbeiða víðari við.s

Mynd 1

Aftursvar býtt á lond
Um vit hyggja at Mynd 1, sæst at ógvuliga ymiskt er frá landi til land, hvat vit hava fingið aftur av svarum.

Tað landið, sum skarar heilt burturúr, er **Holland**. Her hava vit eitt aftursvar uppá heili 5,4 %, sum verður mett ógvuliga høgt. Eisini talið av positivum svarum er ógvuliga høgt frá **Hollandi** 3,3 % ella meira enn helvtin av øllum hollandsku aftursvarunum.

Síðani koma **Schweiz** og **Australia** sum nærum hava sama svartíttleika nevniliga 4,1 % og 3,9 %. Hesi bæði londini liggja eisini javnt í positivum aftursvarum við ávikavist 2,3 % og 1,7%.

Nakað lægri kemur síðani **Týskland** við 2,9 % ið svara aftur, meðan bert 0,8 % svara positivt aftur.

Úr **USA** fáa vit bert 1,7 % aftursvar og her eru tað bert 0,4 %, ið svara positivt aftur.

Singapore og **Hong Kong** svara aftur við ávikavist 2,3 % og 1,4 % og haðani fáa vit positiv aftursvar, ið eru ávikavist 0,0 % og 0,5 %.

Sum sæst tykist at vera ein heilt greiður "tendensur" til at jú nærri Føroyum, í hugburði og siðvenju, móttøkulandið er, jú fleiri svar fáa vit. Tað kann eisini hugsast, at Føroyar frammanundan eru kendar av onkrari fyritøku í londum, ið liggja næst okkum. Eisini sæst, næstan líka týðuliga, at jú nærri Føroyum fyritøkan liggur geografiskt, jú fleiri svar fáa vit.

Tað eru sjálvandi eisini nógv onnur viðurskifti, ið kunnu gera seg galdandi í hesum sambandi.

Til dømis var ein øgiligur vøkstur í nógvum av teimum fjareystligu búskapunum, tá brøvini vórðu send út. Tað er tí hugsandi, at nógvar av fyritøkunum har yviri høvdu størst áhuga í íløgum í fjareystri enn í at koma henda vegin. Hetta verður eisini sagt í nøkrum av teimum kontantu svarunum, sum komin eru haðani.

Nakað tað sama er galdandi í Týsklandi, sum enn er í ferð við at byggja eystara partin av landinum uppaftur, samstundis sum ein øgilig ferð er við at koma á búskapirnar í grannalondunum eystanfyri gamla jarntjaldið. Her gera týskar fyritøkur ógvuliga stórar íløgur í m.a. framleiðslufyritøkur. Men búskaparligi stígurin í Týsklandi kann eisini hava ávirkað.

Í USA fáa fyritøkurnar so nógvan óynsktan post (hópsendingar), sum fer beinleiðis í ruskílætið, at eitt aftursvar uppá 1,7 % er munandi meira enn tað eina procentið, ið vit mettu var sannlíkt at fáa haðani.

Aftursvar býtt á vinnubólkar

Sum greitt frá frammanfyri vórðu ymisk áhugaverd vinnuøkir vald út til forkanningar. Hetta var gjørt út frá meting um, hvat vit kundu bjóða útlendskum fyritøkum, og hvat slag av fyritøkum, ið ynskiligt var at fáa til Føroya. Hesi vinnuøkir vóru síðani bólkaði í fimm fyritøkubólkar. Hetta var gjørt við tí fyri eyga, at tey ið fingu brøvini, skuldu umboða flest sløg av teimum fyritøkum, sum arbeiðsbólkurin metti munadyggast at senda brøvini til.

Hyggja vit at býtinum av svarum á vinnubólkar, síggja vit á Mynd 2, at tað er rættiliga javnt býtt.

Mynd 2

1. Fyritøkur innan alternativa fiskiveiði, fiskaaling, framleiðslu úr havinum og tænastur í hesum sambandi.
2. Fyritøkur innan framleiðslu og tænastuveiting til oljuvinnu og skip.
3. Fyritøkur innan framleiðslu av heilivági, tilfari til heilsuídnaðin, biokemiskum úrdráttum og drykkjuvørum.
4. Fyritøkur innan softwareframleiðslu og tænastur í sambandi við kunningartøkni.
5. Fyritøkur innan hátøkniliga framleiðslu.

Hyggja vit serliga eftir teimum positivu svarunum, síggja vit, at í bólki 2,3,4 og 5 eru júst líka nógv aftursvar nevniliga 5.

Tað er heldur løgið, at tann vinnubólkurin, ið fær fæst svar, er bólkur 1, sum bert fær 5 svar, men av hesum eru heili 4 positiv. Hetta er bólkurin sum m.a. umfatar fiskivinnu og aling, so hugsast kann, at fólk í júst hesum fyritøkum kendu til Føroyar og vinnumøguleikar her, áðrenn tey fingu brævið um at gera fløgur í Føroyum.

Positiv aftursvar býtt á bólkar og lond

Mynd 3

Lond

Tað er hinvegin eggjandi, at fyritøkur innan fleiri ymiskar vinnubólkar, so sum hátøkniliga framleiðslu, softwareframleiðslu og heilivágsframleiðslu, eru áhugaðar í fleiri upplýsingum um Føroyar, sjálvt um vit eiga at ansa eftir ikki at leggja ov stóran dent á tað enn, sí Mynd 3.

Sum sæst er Holland, sum tað einasta landi, umboðað í øllum fimm bólkunum. Svarini úr hinum londunum kunnu í ein ávísan mun sigast at spegla vinnulívsmynstrið í londunum. Tølini eru tó so smá, at ansast má eftir ikki at yvirtulka tey.

Fyritøkurnar sum eru positivar

Tað ber, sum áður sagt, illa til at finna nakran felagsnevnara í sambandi við fyritøkurnar, ið hava svarað positivt aftur. Tær fevna heilt frá teimum minstu til tær allarstørstu altjóða fyritøkurnar, og virkisøki teirra fevnir heilt frá skeljafiskiskapi til hátøkniliga teldframleiðslu.

Størsta fyritøkan, ið hevur svara positivt aftur, hevur eina samlaða árliga sølu uppá fleiri 100 mia. kr. og høvuðsskrivstovu í New York.

Ein tann mest eldhugaða fyritøkan, í sambandi við at koma til Føroyar og gera fløgur, er ein lítil australsk fyritøka, við umleið 15 starvsfólkum, sum selur og elur eitt serligt slag av dýrum skeljafiski, sum tað møguliga ber til at ala í Føroyum.

Allar hinar fyritøkurnar liggja ímillum hesar báðar við fleiri stórum uppí

Samanumtikið um beinleiðis sendingarnar

Samanumtikið er frammanfyri lýst og greinað út, hvussu tað hevur eydnast at koma í samband við størri fyritøkur uttanlands, sum møguliga kundu havt áhuga í at gjørt fløgur í Føroyum. Tá sæð verður burtur frá tí eina svarinum, sigur einki av svarunum frá einum møguligum ítøkiligum áhuga fyri at gera fløgur í Føroyum.

Tað hevði eisini verið eitt ótrúligt hepni, um so var.

Talva 1

Yvirlit yvir aftursvar	Holland	Týskland	Schweiz	Australia	Singapore	Hong Kong	USA	Tilsamans
Brøv send	246	246	232	234	222	238	840	2258
Returbrøv	5	2	10	3	4	19	20	63
Móttikin brøv	241	244	222	231	220	238	820	2195
Positiv aftursvar	8	2	5	4	0	1	3	23
Aftursvar tilsamans	13	7	9	9	5	3	14	60
Aftursvar í %	5,4 %	2,9 %	4,1 %	3,9 %	2,3 %	1,4 %	1,7 %	3,1 %
Positiv aftursvar í %	3,3 %	0,8 %	2,3 %	1,7 %	0,0 %	0,5 %	0,4 %	1,3 %

Endamálið við at senda tilfarið út, við "direct mail", var fyrst og fremst at vita, um hetta var ein nýtiligur háttur at koma í samband við útlendskar fyritøkur. Eftir tí, fløguserfrøðingar í øðrum londum meta, hevur hetta eydnast stak væl.

SAMRØÐUR VIÐ FYRITØKUR, IÐ HAVA SVARAÐ POSITIVT

Sum frammanfyri greitt frá, fevndu positivu svarini yvir rættiliga ymiskar fyritøkur úr ymiskum londum. Fyri at fáa so nógv burtur úr samrøðunum var tí neyðugt at fyrireika samrøðurnar sera gjølla fyri at fáa so sanna mynd av møguleikunum sum gjørligt.

Fyritøkurnar skuldu frammanundan hava skriv, har boðað varð frá, at vit vildu koma at vitja tær, og saman við skrivinum skuldu tær fáa meira tilfar um Føroyar og vinnuligu karmarnar í Føroyum. Valt varð at senda teimum *Faroe Islands Business Environment.* Herumframt varð sent teimum yvirlit yvir spurningar, sum ynskt varð, at samrøðan í hvussu so er skuldi fata um. Til fundin við hvørja fyritøku sær vórðu herumframt evnaðir serligir eyka spurningar.

Niðanfyri er sett upp spurnarblaðið, sum varð sent fyritøkunum.

Questionnaire

Please indicate the importance of the following factors when making direct investment decisions:

	Importance		
	A	B	C
	Low	Medium	High
1. Clean environment	☐	☐	☐
2. Safety & security at work and at home	☐	☐	☐
3. Efficient internal infrastructure	☐	☐	☐
4. Good international transport connections	☐	☐	☐
5. Telecommunications	☐	☐	☐
6. Proximity to the market	☐	☐	☐
7. Membership of International Communities (EU, EEA)	☐	☐	☐
8. Local companies to co-operate with	☐	☐	☐
9. Availability of well educated personnel	☐	☐	☐
10. Universities & other research establishments	☐	☐	☐
11. Competitive labour costs	☐	☐	☐
12. Opportunities to transfer profits from the country	☐	☐	☐
13. Low company taxes	☐	☐	☐
14. Favourable grant options (investment, loan, wages)	☐	☐	☐
15. Fast and efficient processing of your application	☐	☐	☐
Please list other factors important to you:			
16. _____	☐	☐	☐
17. _____	☐	☐	☐

Thank you very much for taking time to fill in this questionnaire.

Tað eigur at verða nevnt, at summar fyritøkur vóru so stórar og týdningarmiklar í altjóða høpi, at neyðugt var at vera sera væl fyrireikaður fyri at varðveita tað positivu mynd, sum longu varð skapt. Í sambandi við vitjanirnar hjá hesum fyritøkum varð tí avgjørt at royna at tryggja, at framtakið varð umboðað við minst tveimum umboðum. Í flestu førum vildi hetta verða gjørt saman við fólki, sum høvdu drúgvar royndir í altjóða uttanríkistænastu.

Herumframt varð hildið rætt at vitja Invest in Iceland, áðrenn vitjað varð hjá áhugaverdu fyritøkunum, fyri at frætta nærri um teirra royndir og úrslit.

Tey lond, sum høvdu víst størsta áhugan fyri at frætta meira, vóru Holland og Schweiz. Tað hevði tí verið náttúrligt at vitja fyritøkurnar í hesum londum fyrst, men av tí at frammanfyri

nevnda fyrireikingararbeiði gjørdist so stórt, varð í fyrstu atløgu valt at vitja so nógvar fyritøkur í Schweiz og USA, sum tað bar til at fáa avtalur við fyri jól.

Nú frágreiðingin verður skrivað, eru fyritøkur í Hollandi, Týsklandi og fyritøkur við høvuðsskrivstovu í Onglandi og partvíst Týsklandi, sostatt ikki vitjaðar. Arbeiðsbólkurin heldur kortini, at samrøðurnar higartil hava víst, at tann mynd, sum arbeiðsbólkurin hevur gjørt sær av møguleikunum, er rímuliga sonn. Men hon hevði uttan iva verið meira fullfíggjað við samrøðum við allar fyritøkurnar.

Arbeiðsbólkurin hevur tí gjørt av, at samrøðurnar eiga at verða gjøgnumførdar, so týtt og knapt frágreiðingin er latin landsstýrinum. Fyritøkurnar rokna við at fáa vitjan og úr hesum samrøðum kunnu koma sjónarmið fram, sum kunnu gera frágreiðingini meira fullfíggjaðar. Tað eigur heldur ikki at vera sæð burtur frá, at úrslit kunnu koma burtur úr hesum samrøðum, ið seinni føra til beinleiðis fløgur í Føroyum.

Roknað verður herumframt við, at úrslitini av hesum samrøðum fara at verða nýtt í arbeiðinum frameftir fyri útlendskum fløgum í Føroyum.

ÚRSLIT AV SAMRØÐUM

Sum heild benda samrøðurnar við útlendsku fyritøkurnar um føroysku vinnu- og fløgukarmarnar ikki á, at serligar forðingar skuldu verið fyri at fingið útlendskar fløgur til Føroya.

Partafelagsskattur

Tað er tó serliga ein einstakur partur av fløgukarmunum, sum verður nevndur aftur og aftur í samrøðunum, nevniliga partafelagsskatturin. Flestu fyritøkur og stovnar, samrøður hava verið við, vísa á støddina á partafelagsskattinum sum altavgerandi fyri, hvar fyritøkurnar velja at gera fløgur. Fleiri av stóru multinationalu fyritøkunum, tosað var við, søgdu beinleiðis, at ógjørligt er hjá øðrum londum at kappast við góðu treytirnar í Írlandi, serliga hvat viðvíkjur partafelagsskattinum.

Um hetta veruliga er ein forðing ella heldur kemur fram, tí tað yvirhøvur kenst trupult hjá fyritøkum at økja eginognina nóg skjótt, kann sjálvsagt vera ein spurningur. Sjálvt um vit í Føroyum hava ein lutfalsliga lágan partafelagsskatt uppá 27 %, eru tað nógv lond sum kunnu bjóða ein nógv lægri partafelagsskatt, heilt niður á 0 %.

Flutningur

Um aðrar partar av vinnulívskarmunum høvdu fyritøkurnar ikki tær stóru atfinningar. Ein fyritøka nevndi, at virkir, sum eru nær tengd at stórum marknaðum, ikki hava nakran fyrimun av at koma til Føroya. Hinvegin vóru tað undrunarvert fáar atfinningar av flutningsmøguleikunum til og úr Føroyum, hvørki loftvegis ella sjóvegis. Tvær av fyritøkunum í Schweiz hildu harafturímóti, at tá vit tvær ferðir um dagin hava flogsamband við

Keypmannahavn, við eini flogtíð uppá 2 tímar, var høgligt hjá teimum at koma til Føroyar. Í so máta njóta Føroyar gott av, at Keypmannahavn er ein loftferðslumiðdepil í Norðureuropa.

Arbeiðsmegi

Stjórarnir í einari av risastóru, multinationalu teldufyritøkunum, sum samrøður hava verið við, hildu ikki at fløgukarmarnir í Føroyum vóru verri enn so nógva aðrastaðni, har teir í løtuni eru virknir. Størsti trupulleikin í Føroyum var, eftir teirra tykki, at arbeiðsmegin í Føroyum er so lítil, at ein ógvuliga skjótt fær torført við at finna nóg nógv av starvsfólki. Hetta ger seg serliga galdandi fyri eina fyritøku sum hesa, har rákið gongur ímóti størri og størri eindum við 500 - 1000 ella fleiri starvsfólkum. Hesir stjórar søgdu seg tó vilja umhugsa møguleikan fyri samstarvi við føroyingar, í sambandi við sertænastur til oljuvinnuna, og søgdu at møguleiki var fyri eini vitjan í Føroyum.

Tað er eyðsæð, at vit í Føroyum ikki eiga at hugsa um at fáa risastór virkir sett á stovn, men heldur eiga at royna at fáa eitt meira fjøltotta vinnulív við minni eindum.

Umhvørvi

Í samrøðunum varð ofta víst á, hvussu virðismikið eitt ódálkað umhvørvi er. Dentur varð lagdur á, at hetta framyvir kom at vera ein ógvuliga tíðandi partur bæði í samband við framleiðslu av t.d. matvørum, drykkjuvørum og heilivági og í marknaðarføringini av vørunum. Tað er púra greitt at reina umhvørvið verður hildið at verða ein av okkara stóru fyrimunum í framtíðini.

Softwareframleiðsla

Tosað varð um møguleikarnar at gera seg galdandi innan kunningartænastu og software-framleiðslu. Av tí at vit við CANTAT-3 kaðalinum eru knýtt til bæði Norðuramerika og Europa, og soleiðis hava støðugt og framkomið samband við allan heim, vístu fleiri á hetta sum ein møguleika fyri menning av føroyska vinnulívinum. Tað varð sagt, at hetta er eitt øki, sum mennist við øgiligari ferð, ið ikki tykist at fara at minka í nógv ár framyvir.

Stjórar í einari av størstu teldufyritøkunum í heiminum, hildu heilt avgjørt, at hetta var eitt øki, sum Føroyar áttu at gera alt fyri at menna. Stjórin í Tele Danmark USA Inc., Richard Pape hevði eisini hetta sjónarmið og helt harafturat at møguleikar áttu at verið innanfyri "call-center" øki.

Eisini stjórin í Invest in Iceland, Ingi Ingason, vísti á ta stóru menning, sum hevur verið á hesum øki í Íslandi seinastu árini. Har hava nógvar smáar softwarefyritøkur ment seg, til nú at vera veitarar til stórar altjóða teldufyritøkur. Á hesum øki er tó stórt trot á arbeiðsmegi, og Ingi Ingason segði, at um verkætlanir á hesum øki í Íslandi kravdu meira enn 10-15 starvsfólk, var næstan ógjørligt av fáa hendur á teimum.

Kunningartilfar
Tilfarið, *Investing in the Faroe Islands* og *Faroe Islands Business Environment*, sum higartil er framleitt til endamálið, er av útlendsku fyritøkunum og øðrum fólki í útlondum, sum arbeiða við útlendskum fløgum, sagt at vera upplýsandi, greitt og borðbært. Sagt verður at tilfarið er fult á hædd við, og í nógvum førum betur enn, tað sum aðrir fløguframastovnar hava gjørt.

NIÐURSTØÐA AV SAMRØÐUM

Tær samrøður sum higartil hava verið við fyritøkur og stovnar í útlondum, benda sum heild á, at gjørligt er at fáa útlendskar fløgur til Føroya.

Niðurstøðan er, at fólk víða um eru positiv um føroysku vinnukarmarnar og møguleikarnar í Føroyum.

Tað er eyðsæð, at onki land hevur allar teir fyrimunir, sum eru ynskiligir, heldur ikki Føroyar. Hinvegin eru í Føroyum heldur ongir vansar, sum heilt útihýsa møguleikanum fyri útlendskum fløgum.

Útlendsku fyritøkurnar halda sum heild, at møguleikar skuldi verið at fingið útlendskar fløgur til Føroyar. Tað er sjálvandi ógvuliga ymiskt, hvat vinnuøki peikað verður á, men øki sum alternativ fiskivinna, alternativ aling, fiskarítøkni, nýggir úrdráttir úr fiski og øðrum havtilfeingi, drykkjuvørur, tænastur til skip, virksemi knýtt at oljuvinnu, kunningartænasta, "call-centur", heilivágur, biotøkni og softwareframleiðsla, hava verið havd á lofti.

Ímillum fyritøkurnar, sum samband hevur verið við, eru fleiri sum siga, at møguleiki er fyri at tær koma til Føroyar at kanna, um vinnuumhvørvið og samfelagið sum heild, kann ganga teirra ynskjum á møti, tá tað snýr seg um at gera fløgur her.

Eisini teir stovnar, samband hevur verið við, hava ta áskoðan, at møguleikar eru hjá Føroyum at fáa útlendskar fløgur. Samstundis er áskoðanin, at føroyskar fyritøkur hava møguleikar at gera seg galdandi í útlondum. Tað sum ræður um, er:

- **At gera vart við Føroyar, gera landið sjónligt fyri møguligum íleggjarum í útlondum**
- **At gera føroyskar fyritøkur kappingarførar og sjónligar í útheiminum**
- **At skapa so góðar vinnukarmar sum gjørligt, ið eru kappingarførir við tað onnur lond bjóða íleggjarum**

Úrslitið av teimum samrøðum sum Invest in the Faroe Islands hevur havt við fyritøkur og stovnar í útlondum, kunnu tí sum heild sigast at hava staðfest, at grundarlag er fyri at halda fram við fløguframtaksvirksemi í Føroyum.

Til fyritøkurnar sum eru vitjaðar er sjálvsagt sent bræv, har takkað verður fyri fundin, við vón um at tær koma til Føroyar at kunna seg nærri um møguleikarnar. Eisini er meira tilfar um Føroyar sent teimum.

7. OLJA

Arbeiðsbólkurin hevur mett tað verið av týdningi at framt forkanningina út frá almennum sjónarmiðum um framtak fyri at fáa útlendskar fløgur til Føroya og út frá verandi viðurskiftum í landinum.

Bólkinum er greitt, at um ein oljuvinna gerst veruleiki undir og í Føroyum, fara nógvar av teimum fyritreytum, sum í dag eru galdandi fyri føroyska samfelagið og vinnuumhvørvið at verða broyttar, og aðrir áhugabólkar enn teir, sum bólkurin hevur valt at vent sær, at vísa áhuga fyri fløgum í Føroyum. Í hesum eru fyrimunir og serligar avbjóðingar, sum tað ikki er okkara uppgáva at viðgera.

Arbeiðsbólkurin heldur, at júst tað eintáttaða virksemi, sum ein oljuvinnu í verandi støðu okkara, kann føra til, heldur eigur at eggja til at skapa tað fjølbroytni í føroyskum vinnulívi, sum útlendskar fløgur á m.a. teimum vinnuøkjum, sum bólkurin hevur vent sær til, kann hava við sær. Eydnast eitt slíkt framtak, vil tað gera samfelagið sum heild og vinnuligt munandi betri fyri at taka við teimum avbjóðingum, sum ein oljuvinna setir okkum.

Í sambandi við forkanningina hava vit eisini vent okkum til oljuvinnuna. Men av tí at vit ikki hava vent okkum til hesa vinnu í okkara næstu grannalondum, lýsa svarini frá hesum meira alment fløguáhugan hjá slíkum fyritøkum.

8. NIÐURSTØÐA

Sjálvt um allar tær útlendsku fyritøkurnar ikki eru vitjaðar enn, eru ábendingarnar so greiðar, at ein tilráðing kann gerast til Vinnumálastýrið.

Arbeiðsbólkurin ræður tí landsstýrinum at halda á við einum fløguframtaki, sum miðar ímóti, at:

1. **Fáa útlendskar íløgur til Føroyar.**
2. **Vísa føroyskum fyritøkum á menningarmøguleikar í útlendskum samstarvi og hjálpa teimum at fáa slík samstørv í lag.**
3. **Meta um og menna vinnulívskarmarnar í Føroyum, gjøgnum samskifti við útlendskar fyritøkur og stovnar.**
4. **Menna fatanina í Føroyum av, at útlendskar íløgur eru eitt gott og mennandi íkast fyri føroyska samfelagið.**
5. **Framleiða tilfar, ið lýsir Føroyar á ein bæriligan, trúverdugan og positivan hátt.**
6. **Kunna um Føroyar í útlondum og vísa á teir møguleikar, sum eru til staðar.**

Tað hevur víst seg at verið ein størri fyrimunur, enn upprunaliga roknað við, at samskipanin av forkanningini og størsti parturin av arbeiðinum fór fram í Føroyum. Hervið er stór vitan og innlit fingið um, hvønn týdning eitt slíkt arbeiði hevur, og hvussu tað frameftir eigur at verða gjørt.

Arbeiðið frameftir eigur sostatt fyrst og fremst at verða gjørt og stýrt úr Føroyum.

Í forkanningararbeiðinum hevur sera góð og holl ráðgeving verið fingin frá útlendsku ráðgevarunum, og hesir kunnu við stórum fyrimuni vera nýttir í arbeiðinum frameftir. Somuleiðis er týdningarmikið at hava gott samstarv við aðrar stovnar, sum arbeiða á sama øki, til dømis Invest in Denmark og Invest in Iceland.

Forkanningin hevur staðfest, at tað við "direct mail" átøkum ber til at gera vart við Føroyar og koma í samband við møguligar útlendskar fleggjarar. Í samrøðum við útlendsku íløguráðgevararnar og fløguframtaksskipanirnar er komið fram, at aðrir hættir at koma í samband við fleggjarar verða nógv brúktir, eitt nú telefonsamrøður við útvaldar fyritøkur, sølufundir við fleiri fyritøkur í einum landi, innbjóðingar at koma at vitja landið, luttøka á messum o.a.

Annar háttur at gera alment vart við landið er við greinum og lýsingum. Hesin háttur hevur longu verið nýttur í ST-tíðaritinum, *The Sustainable Development Agenda 1998*, og aðrastaðir. Nevnast kann, at gjøgnum sendistovuna í New York er samband fingið við tíðarritið *Leaders*, sum verður lisið av nógvum stórum útlendskum fleggjarum, og British-American Chambers of Commerce hevur eisini víst Invest in the Faroe Islands stóran áhuga.

Framtakið eigur sostatt ikki einans at brúka "direct mail" frameftir sum framferðarhátt, men umframt frammanfyri nevndu hættir at vekja áhuga og veita tænastur.

- Við at brúka internótina (heimasíðu)
- Í samstarvi við Uttanríkisráðið, sendistovur og aðrar fløguframaskipanir
- Í samstarvi við tænastufyritøkur, t.d. grannskoðarafyritøkur og fløguráðgevar, í Føroyum og uttanlands, og
- Í samstarvi við tíðindafólk (blaðgreinir, sjónvarpssendingar o.t.)

Tað hevur í samrøðum við fleiri føroyskar fyritøkur, víst seg at vera ein stórur tørvur á ráðgeving og vegleiðing í sambandi við ynski teirra um samskifti og samarbeiði við fyritøkur í útlondum. Hetta er eisini ein uppgáva eitt slíkt átak, í samarbeiði við aðrar stovnar sum Menningarstovuna, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Viðskiftastovuna í Keypmannahavn, við fyrimuni kundi tikið sær av.

SKIPAN

Tað er eyðsæð, at skal eitt framhaldandi átak eydnast, er neyðugt, at tað veitir eina tænastu, ið útlendsku fleggjararnir eru nøgdir við. Fyri forkanningararbeiðið hevur tað havt sera positivan týdning, at tað hevði skrivstovufelagsskap við Atlanticon og helt til í Vinnuhúsinum, samstundis sum tað varð knýtt at Menningarstovuni, sum hevði ábyrgdina mótvegis Vinnumálastýrinum. Tað fyribils plásstrot í Vinnuhúsinum, sum hevur verið í seinastuni, og sum hevur darvað arbeiðinum móti endanum, hevur víst, hvussu týdningarmikið tilknýti til eina skrivstovu/eitt skrivstovusamstarv hevur fyri eitt slíkt framtak.

Fyrispurningar skulu svarast beinanvegin, umbiðið tilfar skal sendast út, og er rætt at vísa fyrispurningum til stovnar og lyklapersónar, skal hetta gerast beinanvegin, uttan mun til um tann, sum stendur fyri framtakinum júst tá vitjar fyritøkur ella er í øðrum ørindum uttanlands.

At standa fyri sjálvum framtakinum er neyðugt við í hvussu so er einum fulltíðarsettum persóni. Við tilknýti til skrivstovu/skrivstovusamstarv kann kostnaðurin av hesari tænastu verða avmarkaður; í aðra máta verður neyðugt við einum persóni afturat. Tó eigur at verða miðað ímóti, tá framtakið rættiliga er komið at virka, at 2 fólk verða knýtt at tí og at peningur verður játtaður til tað arbeiði, sum eigur og má verða gjørt í slíkum sambandi.

Skotið verður upp, at framtakið verður tænastuliga knýtt at Vinnuhúsinum og Menningarstovuni, ið skal hava formligu ábyrgdina, og at tað annars liggur undir Vinnumálastýrinum.

Ein breiður ráðgevandi bólkur eigur at verða knýttur at framtakinum, á sama hátt sum tað hevur verið gjørt í forkanningini, fyri bæði at kunna stuðla framtakinum við tí servitan, hesi fólk hava og fyri at tryggja so góða undirtøku fyri framtakinum sum gjørligt, bæði hjá almennu myndugleikunum, vinnulívinum og vanliga fólkinum.

Mælt verður herumframt til, at framtakið hevur neyvt samstarv við aðrar stovnar, bæði í Føroyum og uttanlands, sum kunnu stuðla og hjálpa við serligum uppgávum, og sum tað hevur týdning at kunna um gongdina.

KOSTNAÐUR

Sum skjal til hesa frágreiðing er løgd við kostnaðarætlan uppá 1.000.000 kr. fyri framtakið í 1998. Hon byggir á uppskotna skrivstovutilknýti, og at tænastur í ávísan mun verða keyptar frá føroyskum og útlendskum tænastuveitarum og serfrøðingum. Tað er herumframt lagt upp til samstarv við útlendskar ráðgevar. Hesir eru á staðnum, har møguligu fleggjararnir halda til, og eru harafturat sera góðir í ráðum og kunnu taka sær av einum parti av tí arbeiði, ið skal gerast í útlondum.

Í kostnaðarætlanini fyri 1998 er ikki lagt upp til "direct mailing", men í fyrsta umfari at fara undir gerð av nýggjum tilfari, sum lýsir Føroyar á serligan hátt, t.d. umhvørvið, biotøkniliga ella møguleikar fyri softwareframleiðslu.

Kostnaðarætlanin byggir á verandi játtan á løgtingsfíggjarlógini fyri 1998. Upphæddin verður mett í teprara lagi, og tí eigur rúmari játtan at verða sett av á komandi fíggjarlógum, ið tryggjar, at framtakið kann verða miðvíst og áhaldandi. *Ikki ber til at fáa munagóð úrslit eftir stuttari tíð. Íløgur í útlondum eru hóast alt eitt av teimum økjum har fyritøkurnar hava longstu ætlanarlegging, ofta 5 – 10 ár.*

FRAMTAK FYRI ÚTLENDSKAR ÍLØGUR

KOSTNAÐARÆTLAN 1998

Lønir og samsýningar	kr 325.000,00
Føroysk ráðgeving	kr 30.000,00
Útlendsk ráðgeving	kr 60.000,00
Ferðaútreiðslur	kr 140.000,00
Vitjan úr útlondum, umboðan v.m.	kr 30.000,00
Skeið	kr 25.000,00
Telduútgerð	kr 50.000,00
Húsaleiga v.m.	kr 95.000,00
Kunningartilfar v.m.	kr 100.000,00
Lýsingar	kr 90.000,00
Annað	kr 10.000,00
Meirvirðisgjald	kr. 45.000,00
Tilsamans	kr 1.000.000,00

KOSTNAÐUR AV FORKANNINGINI

1. Keyp av adressum og upplýsingum	kr	27.311,00
2. Útsending av brøvum	kr	110.727,41
3. Lønir	kr	361.295,00
4. Føroysk ráðgeving	kr	17.807,00
5. Útlendsk ráðgeving	kr	37.475,20
6. Húsaleiga, telefon v.m.	kr	31.209,35
7. Ferðaútreiðslur	kr	83.463,66
8. Annað	kr	172,00
9. Meirvirðisgjald	kr	10.728,66
10.Tilsamans	kr	680.189,28

Ad. 1: Í upprunaligu kostnaðarætlanini, sum lá um 600.000 kr, tordi arbeiðsbólkurin ikki at gera nakra meting av, hvussu nógv tað fór at kosta at fáa adressur hjá teimum fyritøkum til vega, sum forkanningin skuldi venda sær til. Tá ið arbeiði við forkanningin varð sett í gongd, gjørdist skjótt greitt at júst hetta --- at finna og velja út teir røttu vinnubólkarnar og tær røttu fyritøkurnar, var av avgerandi týdningi fyri, at forkanningin skuldi eydnast. Arbeiðsbólkurin avgjørdi tí, at stórur dentur skuldi leggjast á hetta arbeiði. Úrslitið av hesum er, sum sæst omanfyri, at bert 27.311,00 kr. vóru nýttar til beinleiðis til keyp av hesum upplýsingum, meðan ein munandi partur av lønarútreiðslunum í pkt. 3, er nýttur til fyrirreikingararbeiði í hesum sambandi.

Ad. 2: Til framleiðslu og útsending av brøvum, metti arbeiðsbólkurin kostnaðin at verða um 100 kr. fyri hvørt brævi. Hetta hevði so, um vit samanbera við tali á útsendum brøvum, svarað til umleið 225.000 kr. Hetta er munandi meir enn tær 110.727,41 kr., sum gjørdist endaliga úrslitið í hesum sambandi. Av hesum 110.727,41 kr. eru 41.668,00 kr. postgjald til sjálva útsendingina. Hinar 69.059,41 kr. eru nýttar til framleiðslu og prenting av tí tilfarið, sum sent varð útlendsku fyritøkunum. Tilfarið, sum varð framleitt, var brævpappír, brævbjálvar, visittkort, svarkort og kunningarfaldarin um Føroyar og føroysku vinnulívskarmarnar. Okkum var sagt, at um eitt sovorðið tilfar ikki var dygdargott og bæriligt á einhvønn hátt, var stórur vandi fyri, at tað ongantíð kom í hendurnar á teimum avgerðartakarum, tað var stílað til. Arbeiðið við lay-out, rættlestri, framleiðslu og útsending av brøvunum tók drúgva tíð.
Arbeiðsbólkurin legði dent á , at hetta arbeiði var gjørt í Føroyum.

Í sambandi við oljumessuna, Offshore Europe 97 í Aberdeen í september 1997, var mett at kunningarfaldarin var vælegnaður at lata fólki við áhuga í føroysku oljuvinnuni. Hann var tí endurprentaður og kostaði hetta 14.331,20 kr.

Ad. 3: Sum áður sagt, metti arbeiðsbólkurin, at týdningarmikið var, at samskipanin av forkanningini og størsti parturin av arbeiðnum fór fram í Føroyum, fyri á henda hátt at fáa so stórt innlit og vitan um hvussu slíkt virksemi eigur at vera framt. Arbeiði var upprunaliga mett at taka einar 7 mánaðir, men kom at taka dupult so langa tíð.

Ad. 4 og 5: Útreiðslurnar til útlendsku ráðgevarnar 37.475,20 kr., vóru upprunaliga mettar til 80.000 kr. Sum greitt frá omanfyri, komu teir ikki at vera so nógv brúktir í forkanningina sum upprunaliga mett. Í fyrirreikingini hava eisini føroyskir ráðgevar verið nýttir.

Ad 6: Forkanningin fekk skrivstovutilhald og leigu av skrivstovuútbúnaði, teldum, telefon o.a. hjá Sp/f Atlanticon í Vinnuhúsinum fram móti ársenda 1997.

Ad. 7: Upphæddin, sum nýtt er í hesum sambandi, umfatar bæði ferðaseðlar, gisting, bilaleigu og dagpening. Ein partur av hesari upphædd, er goldin til ferðaseðlar í sambandi við tær fyritøkuvitjanir, sum enn eru eftir at gera í Europa.

Ad 9: Sum tað sæst verður meirvirðisgjaldsparturin av slíkum framtaki lítil.